# »Minn meg á« álmanakkin komin




**Nú er væl umtókti »Minn meg á« álmannanakkin komin á hillarnar í handl-um kring landið. Álmanakkin er frá juli 2001 til juni 2002**

ÁLMANAKK-ÚTGÁVA
*Heini í Skorini*

Fyri fjórðu ferð verður álmanakkin »Minn meg á« givin út, og inniheldur hann nógv hent í gerandisdegnum. Álmanakkin er vorðin sera væl umtóktur serliga millum skúlaungdómar, og tað er Annfinnur Zachariassen, sum hevur fingið hugskotið til útgávuna.

Álmanakkin er frá juli 2001 til juni 2002, og kostar hann 55 kr., har Barnahjálpargrunnurin fær 5 kr. av hvørjum eintaki. 146 síður eru í »Minn meg á« álmanakkanum, hann er á A5 stødd, og spiralbinding er eisini á álmanakkanum.

### Inniheldur nógv

Í álmannakkanum er mánaðaryvirlit, ein vika er á hvørji opnu, navnayvirlit, heimasíður, teldupostur, minnisdagar, minnisblað, postnummar í Føroyum, og so eru 29 orðatøk prentað niðast á hvørji síðu.

Anker Eli Petersen hevur gjørt permumyndina, Einars Prent hevur staðið fyri at prenta og bundið inn, meðan Sune Joensen hevur rættlisið. Poul Hansen hevur lagt til rættis at fáa álmanakkan útgivnan, og hugskotið til júst útgivna »Minn meg á« álmanakkan eigur Annfinnur Zachariassen.

# Tjóvar ov gløggir fyri løgregluna




*Enn hevur løgreglan ikki funnið fram til gerningsmenninar í P/A Restorff og hjá Gunleivi*

**Nú er nakað liðið síðani peningastuldur varð framdur í bæði P/A Restorff og hjá Gunleivi í Havn, og løgreglan er framvegis ikki komin nærri nøkrum úrslitið. Framvegis ganga tjóvarnir leysir við mappuni á tremur**

STULDUR
*Heini í Skorini*

13. apríl í 2000, yvir einum ári síðani, varð peningastuldur framdur í P/A Restorff í Sigmundargøtu í Havn. Tjóvurin kom eitt kvøldi inn við onkrum, fólk halda vera eina skammbyrsu, og hótti hann síðani kassadamuna. 10.000 krónur vórðu stolnar hetta kvøldið, og meiri sást ikki til viðkomandi.

Nú er so meir enn eitt ár liðið síðani júst umtalaðu hending, men framvegis er løgreglan í Havn ikki komin nærri einum úrsliti. Georg Otthamar á kriminaldeildini á løgreglustøðini í Havn sigur, at hóast arbeitt verður við málinum eftir umstøðunum, er ikki komið fram til nakað ítøkiligt, sum hevur fingið løgregluna víðari í málinum. Tjóvurin við teimum 10.000 krónunum er sostatt sloppin væl frá stuldrinum í eitt gott ár, og einki bendir á, at verandi støða broytist í bræði.

### Størsti stuldur hjá Gunleivi

Kanska hevur onkur fingið blóð á tonna, ella á ein ella annan hátt er farin at hugsa størri av hesi hending, tí 27. mars í ár varð aftur stuldur framdur í Havn í Bakaríinum hjá Gunleivi við Landavegin, og hesaferð hvarv ein nógv størri upphædd.

Ikki minni enn 120.000 krónur vórðu hesaferð stolnar úr pengaskápinum hjá Gunleivi, og er hetta sambært kriminaldeildini hjá løgregluni í Havn óvanliga stórur stuldur í Føroyum.

Sostatt stóð løgreglan knappliga við tveimum málum um peningastuldur, eitt á 10.000 krónur hjá P/A Restorff, meðan næsti stuldur var langt omanfyri horvnu upphæddina hjá P/A Restorff, nevniliga á120.000 krónur hjá Gunleivi.

Um gerningsmenninir hava verið ymiskir, gjørdi seinni tjóvurin fyrra stuldurin veruliga til skammar, tí 10.000 krónur er ikki júst tað sama sum 120.000 krónur.

### Løgreglan stendur á berum

Kriminaldeildin á løgreglustøðini í Havn heldur ikki, at samband er millum hendingarnar. Men afturat hesum sigur løgreglan seg ikki vita meiri, enn hon hevur gjørt, tá byrjað varð at arbeiða við hesum báðum málum. Royndir vórðu tiknar beint eftir hendingina hjá Gunleivi og sendar niður til Danmarkar, men hetta hevur eftir øllum at døma ikki ført við sær nakra niðurstøðu.

Tað er greitt, at stuldurin hjá Gunleivi varð framdur millum kl. 23 um kvøldið og kl. 7 um morgunin 27. mars, men tað er avmarkað, hvussu langt ein kemur bert við hesi vitan.

### Slopnir væl higartil

Sostatt kann sigast, at gerningsmenninir higartil eru slopnir væl frá stuldrunum, tí enn er einki meiri hent viðvíkjandi málunum. Eitt bankarán varð framt á heili 500.000 kr í 80´unum, men tá fekk løgreglan fatur á bæði gerningsmanni og peningi. Um løgreglan megnar at endurtaka hetta, fer bert tíðin at vísa.

Í hvussu so er ganga tjóvar í løtuni kring Havnina ella aðrastaðni í Føroyum við lummunum fullum av stolnum peningi, og tykjast teir hava gjøgnumført arbeiði sítt til fulnar. Í øllum førum stendur løgreglan enn á berum.



# Fleiri oljuskip á Havnini



*Tað bláa veitingarskipið hjá BP vinstrumegin og tað reyða standby skipið hjá Thor høgrumegin. Skip við tilknýti til oljuvinnuna seta dám á býarmyndina í Havn*

**Borurin er settur í undirgrundina, og hetta merkir longu býarmyndirna í Havn. Týsmorgunin lógu tvey skip, ið hava tilknýti til oljuvinnuna, við bryggju í Havn**

SKIP
*Stefan í Skorini*

Havnirnar í Runavík og í Havn eru farnar at merkja árinið frá oljuvinnuni, sum nú er byrjað við Føroyar. Veitingarskipini (supplybátar) og standby-bátarnir gerast fleiri í tali og liggja nú ofta við bryggju í Føroyum.

Hóast Runavík er tann almenna oljuútgerðarhavnin, so eru slíkir bátar ofta at síggja í Havn. Týsmorgunin lógu tann blái Highland Spirit hjá British Petroleum og tann reyði Faroe Connector hjá Thor í Hósvík við vestaru bryggju í Havn.

Havila Charisma er veitingarskipið, ið siglir út til Sovereign Explorer, men tað siglir frá Runavík.

### Smittar av

Faroe Connector siglir beint nú sum standby skip hjá boriskipinum West Navion hjá BP, sum ger royndarboringar.

Sum standby skip skal Faroe Connector vera tilreiðar um okkurt óhapp hendir undir royndarboringunum. Eisini skal skipið syrgja fyri, at eingin óviðkomandi kemur inn á trygdarøki, sum er 500 metrar frá boringini. Vanligt er, at hesar royndarboringar vara í 28-40 dagar.

Highland Spirit er eitt skip hjá BP. Tað er eitt veitingarskip, sum siglir til boripallin Schiehallion. Hesin boripallur er í bretskum øki, so oljuboringin uttanfyri føroyska markið kastar eisini av sær her í Føroyum.

Eitt veitingarskip siglir provianti, olju, vatni og útgerð til boripallarnar, so teir ongantíð eru í uppisetri við nøkrum neyðsynjarvørum.

Faroe Connector er tað fyrsta skipið, sum er skrásett í skipabólkinum standby skip í Føroyum. Har eru tólv mans umborð á skipinum. Av teimum eru átta føroyingar og fýra danir. Av Thor verður sagt, at ætlanin er, at bara føroyingar skulu manna skipið í framtíðini.

Tann 1. juli í ár varð Faroe Connector yvirtikin av Thor í Hósvík. Tað er bygt í Litava í fjør. Skipið er 65,6 metrar til longdar, 14,6 metrar breitt, og tað stingur 7 metrar.

# Villmenn geva fløgu út



*Holgar Jacobsen hevur gjørt øll løgini á nýggju fløguni hjá hansara villmonnum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Vágabólkurin Holgar og Villmenn hevur sent eina nýggja fløgu á gøtuna. Hon eitur "Súrt og Fólkaligt" og spennir víða innan tónleikin, heldur útgevarin**

FLØGUÚTGÁVA
*Stefan í Skorini*

Enn einaferð var ein nýggj fløga á marknaðinum, og hetta er tann fyrsta fløgan hjá Holgari og hansara villmonnum. Tað er Holgar Jacobsen, sum stendur á odda fyri bólkinum, og hann syngur og spælir guitar.

Holgar sigur, at henda útgávan spennir víða, tí løgini eru alt frá aukustiskum løgum til harðan rokk, og at hetta er guitarbaseraður tónleikur.

Alt tilfarið á fløguni er heimagjørt, og tey flestu løgini eru nýggj, men nøkur eru gjørd fyri nøkrum árum síðani. Tað er Holgar Jacobsen, sum hevur smíðað øll løgini og gjørt orðini til tey. Einki av hesum løgunum er innspælt fyrr.

### Leingi á veg

Holgar og Villmenn hava leingi havt ætlanir um at geva fløgu út, og tosað hevur verið um eina fløgu seinastu trý árini. Ikki fyrr ein verkfallið hjá arbeiðarafeløgunum var í vár, fingu teir stundir at fara undir upptøkurnar.

Hinir limirnir á bólkinum eru Jákup á Stongum (kór og akk. guitar), John Edvin Joensen (bass) og Albin Wang Ísakson. Navnið Holgar og Villmenn er frá einari Prix Føroyar kapping, og tað hevur hingið við síðani.

Holgar Jacobsen hevur verið við til at givið tvey bond út fyri nøkrum árum síðani. Tað eina var við bólkinum Sørvings, har Jákup á Stongum eisini spældi við, og hitt var við bólkinum Ghostrider. Bondini vórðu útgivin í 1989 og í 1990.

Fløgan er upptikin í Studio Pegasus í Klaksvík, og Holgar sjálvur er væl nøgdur við úrslitið og ljóðið. Plátufelagið Tutl gevur fløguna út.

In G (les Ingi) Isaksen hevur staðið fyri upptøkuni, og hann hevur harumframt eisini spælt tangentar á nøkrum løgum.

Fløgan er framleidd í Týsklandi og fæst nú í sølubúðunum.